Serfrøðingur í vindorku:

# – Politiskur vilji skal til

**Einasti máti at tryggja vindorkuni ein møguleika at koma ístaðin fyri oljuna, tað er at smíða landsins lógir soleiðis, at privatar fyritøkur verða eggjaðar at gera íløgur innan vindorkuna. Tað sigur Preben Maegaard, forseti í Heimsins Vindorku Felagsskapinum**

ORKUPOLITIKKUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Norðurlandahúsið varð hósdagin karmur um tiltak, ið setti fokus á orkupolitikk við atliti til umhvørvið. Trý høvuðsupplegg vóru á fundinum, nevniliga uppleggini hjá landsstýrismanninum í orkumálum, Bjarna Djurholm; Klæminti Weihe, stjóra í SEV; og Preben Maegaard, forseta í Heimsins Vindorku Felagsskapin.

Preben Maegaard helt fyrilestur um møguleikarnar fyri og fyrimunirnar við vindorku. Preben er ikki í iva um, at vindorka hevur stóra týdning fyri samfelagið, umhvørvið, og búskapin sum heild. Hann sigur, at tær ikki-varandi orkukeldurnar, so sum olja, fara at verða ein mangulvøra, og innanfyri eitt ávíst áramál fer ongin olja at verða eftir.

- Eg skal ikki standa her og ljóða sum ein dómadagsprofetur, men avleiðingarnar kunnu gerast sera álvarsligar, um vit ikki royna at menna tær varandi orkukeldurnar, sigur Preben Maegaard.

Preben Maegaard sipar til, at tá framførslan av olju minkar og fer at minka meir, so fer prísurin av olju rúkandi uppeftir, um ikki eftirspurningurin eftir olju er farin niður til ta tíð. Samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar av einum sera høgum oljuprísi eru altíð sera umfatandi og álvarsligar, soleiðis sum verðin eisini hevur sæð tað fyrr.

Preben Maegaard sigur, at til tess at sleppa undan hesum búskaparliga trupulleika, er tað neyðugt útbyggja tær varandi orkukeldurnar, soleiðis at tær so við og við kunnu koma ístaðin fyri steinolju-orkuna. Her sigur Preben Maegaard aftur, at vindorka er ein gongd leið.

Hann vísur á, at einasti máti at tryggja vindorkuni ein møguleika at koma ístaðin fyri oljuna, tað er at smíða landsins lógir soleiðis, at privatar fyritøkur verða eggjaðar at gera íløgur innan vindorkuna.

- Tað eru nøkur ting, sum skulu uppfyllast til tess at tryggja vindorkuni livandi umstøður. Tað fyrsta er, at øll skulu hava atgongd til el-netið. Harumframt skulu íleggjarar í vindorkuvinnuna fáa ein fastan og rímiligan prís fyri teirra orkuframleiðslu. Og aftrat tí skulu teir fáa stuðul til at gjalda byrjunarkostnaðin, sigur Preben Maegaard.



*Preben Maegaard, forseti í Heimsins Vindorku Felagsskapinum, er greiður á máli um týdningin, sum vindorkan hevur og fer at hava í framtíðini.*
*– Varandi orka er framtíðin, og harímillum er vindorkan ein tann mest lovandi. Og tað er uttan iva, sigur Preben Maegaard*

Í Føroyum er tað SEV, sum eigur rættin til at brúka el-netið. SEV hevur givið smápartafelagnum Røkt í Vestmanna loyvi at nýta netið til ta orkuna, sum teir framleiða við teimum trimum vindmyllunum, sum teir hava. SEV keypir eisini orkuna frá Røkt fyri ein ávísan fastan prís.

Men hetta merkir ikki, at umstøðurnar í Føroyum at framleiða vindorku eru góðar hjá smápartafeløgum. Vit hoyra í Degi og Viku hóskvøldið, at nú SEV fer at seta fleiri vindmyllur upp, so er ikki pláss fyri fleiri vindmyllum á netinum hjá SEV. Tað vil við øðrum orðum siga, at smápartafelagið Røkt ikki hevur møguleika fyri at vaksa um sítt virksemi.

Preben Maegaad sigur, at tað er politiski mynduleikin, sum eigur at tryggja hesar umstøðurnar.

Men tað verður ikki gjørt í Føroyum í løtuni, tí vit hava ongan yvirordnaðan umhvørvispolitikk. Og Jóhann í Niðristovu, ein av monnunum aftanfyri smápartafelagið Røkt, sigur við Dag og Viku hóskvøldið, at um tað er hetta, man vil frá politiskari síðu, so kunnu teir í Røkt bara gevast, tí verkætlanin er ikki meira enn hálvliðin.

Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í vinnumálum, og hann situr eisini við orkumálum. Hann segði á fundinum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, at arbeitt verður við at stinga út í kortið ein føroyskan orkupolitikk. Landsstýrismaðurin væntar, at miðskeiðis í mai mánaði er ein nevnd sett at arbeiða við hesum.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur í sambandi við vindorkuna og grundgevingarnar hjá Preben Maegaard, at vindorka er ein óstøðug orkukelda, og tískil mugu vit í Føroyum ansa eftir, at vit ikki enda við eini vánaligari el-góðsku.

- Eg eri stjóri í SEV og havi ábyrgdina av, at føroyingar fáa eitt gott produkt fyri teir pengarnar, sum teir gjalda fyri orku frá SEV. Trupulleikin við vindorkuni er, at hon varierar ógvuliga nógv, og hvørja ferð vindorku-framleiðslan fer niður um eitt ávíst mark, so skal onkur onnur orkukelda verða klár at taka yvir beinanvegin. Og tú skalt ikki merkja tað heima hjá tær sjálvum, at ein onnur orkukelda júst hevur tikið yvir. Men hetta er sera trupult í praksis, og tað er okkara stóri trupulleiki at dragast við í sambandi við vindorku, sigur Klæming Weihe, stjóri í SEV.

Tað eru fýra vindmyllur í Føroyum í løtuni, og tær framleiða knapt átta milliónir kilowatt-tímar.



*Orkufundur í Norðurlandahúsinum: Klæmint Weihe til vinstru, sum er stjóri í SEV, sigur at vindorka er ein óstøðug orkukelda, og at vit í Føroyum tískil mugu ansa eftir, at vit ikki enda við eini vánaligari el-góðsku. Men Preben Maegaard í miðjuni, forseti í Heimsins Vindorku Felagsskapinum, sigur harafturímóti, at vindorkan helst er tann best gongda leiðin í dag og í framtíðini. Í Føroyum er ongin yvirordnaður orkupolitikkur, men Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, sigur at hann arbeiðir við at orða ein slíkan politikk fyri allar Føroyar*






# Borgarin slapp ikki upp í part

**Mikudagin vundu hjúnini Heini og Ragna Glerfoss í Mikladali Merkið í hálva stong. Hetta fyri at vísa teirra ónøgd við framferðarháttin hjá Mikladals kommunu í sambandi við kommunusamanleggingina. Borgarin slapp ikki upp í part, siga tey**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Mikladalur:** Ragna og Heini Glerfoss í Mikladali eru als ikki nøgd við háttin sum kommunusamanleggingin millum Klaksvík og Mikladal er farin fram. Og hetta gjørdu tey sjónliga vart við við at vinda Merkið í hálva stong mikudagin, sum var dagurin, tá sáttmálin skuldi undirskrivast.

Sáttmálin er nú undirskrivaður, og greitt er, at frá 1. januar verður Mikladals kommuna løgd saman við Klaksvíkar kommunu.

– Tað eru vit sum so ikki so øgiliga kedd av, men vit vundu Merkið í hálva stong, tí hetta var einasti máti hjá okkum at vísa okkara ónøgd við framferðarháttin hjá okkara kommunu, sigur Ragna Glerfoss.

Hon heldur, at tað er ov galið, at borgararnir í Mikladali og á Trøllanesi ikki sluppu at hava eitt orð at siga í hesum málinum.

– Vit vórðu boðin til borgarafund, men tá lat til, at alt mest sum var leyst og liðugt uttan, at vit borgarar vóru spurd um nakað, sigur hon hørm á málinum.

Hjúnini duga heldur ikki at síggja nakran sum helst fyrimun við, at kommunan verður løgd saman við Klaksvíkar kommunu.

– Tað verður ikki verri í bygdini enn tað sama, tað vita vit væl. Men eg spyrji bara, hvussu klaksvíkingar skulu kunna fáa viðurskifti í lag her í bygdunum, sum ikki hava verið í lagi longi, tá okkara egna fólk ikki megnar tað, sigur hon.

Men samstundis fegnast hon vegna bygdarfólkið á Trøllanesi, at kommunurnar verða lagdar saman.

– Tað verður uttan iva gott fyri fólkið á Trøllanesi. So kanska tey verða hoyrd, tí tað vóru tey ikki her, sigur Ragna Glerfoss í Mikladali.

Borgarstjórin í Mikladals kommunu, Markus í Norðnástovu, er ikki samdur við hjúnunum Glerfoss. Við Degi og Viku hóskvøldið segði hann, at tað var betur fyri bygdirnar báðar, at ongin fólkaatkvøða var, tí annars hevði vandi verið fyri, at bygdirnar aftur fóru í tvíningar, sum við skúlamálinum fyri nøkrum árum síðani, tá skúlin á Trøllanesi lat aftur. Eisini helt Markus í Norðnástovu, at tað tykist sum, at meginparturin av bygdarfólkunum eru fyri samanlegging, og tískil heldur hann, at kommunan hevur gjørt bygdarfólkunum eina tænastu við at taka hesa avgerðina fyri tey heldur enn at koyra tað út til fólkaatkvøðu.



*Mikudagin vundu hjúnini Ragna og Heini Glerfoss Merkið í hálva stong fyri at gera vart við teirra ónøgd við framferðarháttin hjá Mikladals kommunu í kommunusamanleggingini. – Tað bleiv lagt saman, uttan at borgarin slapp at siga sína meining, siga tey*

W W W . S O S I A L U R I N . F O

